

G.g. Hetta heftið er ikki liðugt, men ein fyribilsútgáva!

# SSP – Um at ferðast á Netinum

Nærningabókin, ssíða 48

Nógvar góðar undirvísingargongdir eru at finna á Snar.

Undirvísingartilfar liggur inni á snar.fo/ssp viðvíkjandi at ferðast á Netinum. Til ber at brúka partar av hesum í sambandi við kapittul 3: Lógarbrot og revsing.

## Um at ferðast á netinum

At reika á netinum er ein natúrligur partur av gerandisdegnum hjá flest øllum, bæði børnum og vaksnum. Hetta setur krøv um skilagóðan atburð og hvussu tú tryggjar títt privatlív.

Ein væl tilrættisløgd undirvísingargongd í ymiskum lærugreinum, har næm ing urin fer í dýpdina saman við sínum floksfeløgum, tryggjar at evnið verður tikið í álvara og fær neyðuga viðgerð.

Somuleiðis er sera umráðandi, at foreldr ini hava ein virknan leiklut. Fyri hvørt evni er ein heimasetningur, har foreldrini og barnið í felag viðgera ymiskar spurningar, ið stinga seg upp í kjalarvørrinum av kunningartøknini. Undirvísingartilfarið leggur dent á fimm viðkomandi tættir, ið stuðla upp undir fyribyrgjandi gongdina, ið er:

**VITAN + HUGBURÐUR = ATBURÐUR**

Ein slík skipað tilgongd er – saman við foreldrafundum og øðrum átøkum í SSP – við til at menta okkara børn og ungu til at gerast skilagóðir og vandalig ir brúkarar, tá ið teir reika á net in um og brúka mongu pallarnir og samskiftishætt irnar har.

